

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 11 - 2011

# Kunnu vænta enn størri prísfall

Fimmta dagin á rað fall prísurin á norðsjóvaroljuni hósdagin, Hetta er tað drúgvasta prísfallið síðani í summar, men greinarar vænta, at prísurin kann fella uppaftur meiri orsakað av kreppuni í evruøkinum og serliga Grikkalandi. Hóast Grikkaland er langt frá G20, stóð landið ovast á dagsskránni, tá leiðararnir hittust í Cannes. Men George Papandreou fór heimaftur sum av torvheiðum, tí hann fekk stutt og greitt at vita, at grikski ríkiskassin fær ikki so mikið sum eina evru, fyrr enn grikkar hava gjørt av, hvat teir ætla. Óttin fyri ruðuleika í Grikkalandi ávirkaði alt fyri eitt oljumarknaðin, og tað gjørdi ikki støðuna betur, at tøl frá Markit Eurozone Manufacturing Purchasing Managers Index vístu, at virksemið í evropeiska ídnaðinum minkaði í oktober. Og sum um tað ikki var nóg mikið, kunngjørdi amerikanski tjóðbankin, Fed, at vakstrarútlitini í 2012 eru verri enn hildið, og at arbeiðsloysið fer at veksa. Thina M. Saltvedt, sum er oljumarknaðargreinari hjá Nordea, sigur við Aftenbladet, at betri tøl um gongdina á amerikanska arbeiðsmarknaðinum eru tað einasta, sum kann fáa oljuprísin at hækka nú. Hinvegin er ikki stórvegis vandi fyri ov stórum prísfalli, tí fellur prísurin ov nógv, fara Opec-londini at skrúva so mikið fyri, at prísfallið steðgar. IMF ger í einari nýggjari frágreiðing eisini vart við, at Opec-londini hava brúk fyri pengum til at halda javnvágina í fíggjarpolitkkinum, og at tey tí hava brúk fyri einum hægri oljuprísi.